# Tiltøk

## Ebenezer
Fríggjadagin kl. 20 ungdómsmøti.

## Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

## Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 06 morgunbøn, í morgin kl. 06 morgunbøn kl. 21 ungdómsmøti.

Fríggjadagin kl. 06 morgunbøn, kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn.

Sunnudagin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta v/Tummas Jacobsen, kl. 18 felagsmøti í Evangeliihúsinum, kl. 22 útimøti (um viðrar).

## Frelsunarherurin Tórshavn
Kristihimmalsferðardag og fríggjadagin kl. 20 møti.

Leygardagin kl. 11 útimøti kl. 16 bíbliutími, kl. 20 møti.

Sunnudagin kl. 11 møti. Peter Baronowsky leiðir og talar.

## Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Hóskvøldið kl. 20 møti við Klæmint Tausen.

Sunnukvøldið kl. 18 møti við Andrassi Arge.

## Meinigheitshúsið í Havn
Kristi Himmalsferðardag kl. 18 møti v/Niels Jacob Nielsen, trúboðara.

Fríggjadagin kl. 20 møti v/Jens Dam, fyristøðumanni á Hedemølle Eftirskúla.

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti v/ Klæmint Tausen.

## Meinigheitin í Hoyvík
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti hjá fam. á Borg, Borgartún 8. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli í Hoyvíkar skúla. Um viðrar, skipar sunnudagsskúlin fyri uttandura tiltøkum, har øll familjan er vælkomin. Kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti við Dánjal og Jenis av Rana.

Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Sofrid og Sámal úr Depli, Tjarnalág 14. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Rhema á Hálsi
Sunnudagin kl. 11 familjumøti.

Mánadagin til mikudagin kl. 06 morgunbøn. Øll eru vælkomin.

## Gudstænastur Kr. himmalsfarðardag
*Eiði:* kl. 10.40 skriftamál, kl. 11 messa Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri Føroysku Heidningamissiónina hjá Kirkjuliga missiónsfelagnum.

*Vesturkirkjan:* kl. 11 Bergur D. Joensen. Talvan gongur fyri Heidningamissiónina hjá Kirkjuliga missiónsfelagnum.

*Havnar kirkja:* kl. 11 Sonja Klein, talvan gongur fyri Kirkjuliga missiónsfelagið. Kl. 20 Hans J. Joensen, biskupur.

*Nólsoy:* kl. 12 Bjarni Bæk, talvan gongur fyri Kirkjuliga missiónsfelagið.

Talvan gongur í Kaldbaks kirkju fyri Kirkjuliga missiónsfelagið.

## Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti, Sam Jacobsen talar.

Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

## Felagsmissiónsvika í Vestmanna
Kl. 19.30 møti í auluni við Jens Dam og Knud W. Skov úr Danmark, sangbólkur úr Havn syngur, kl. 22.30 lovsongsløta .

Leygardagin kl. 19. 30 møti við Sigfred Johannesen av Nesi og menn úr Kollafirði syngja, kl. 22.30 gospelkonsert í høllini.

## Ítróttarhøllin á Giljanesi
Tiltakið sum Heimamissiónin skipar fyri: Sunnudagsskúlin ár 2000 »Eingin er ov lítil til Jesus« verður hósdagin (Kr. himmalsferðardag) kl. 15. Tiltakið er fyri alla Vágoynna. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 19 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Jón Joensen.

Týsdagin kl. 20 húsmøti við Anthony & Charles Johansen, Saltangará.

Hósdagin kl. 20 bønarmøti.

Morgunbøn er mánamorgun, mikumorgun og fríggjamorgun frá 6-7.

## Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús við Fríðtór Debes.

Sunnudagin kl. 17 møti við Oydis og Martin Olsen, kl. 17 barnamøti.
http://kort.olivant.fo/~keldan/

## Meinigheitshúsið á Skála
Í samband við at húsið fylti 40 ár, verður bjóða til borðhald Kristi himmalsferðardag kl. 19. Øll eru vælkomin. Ársgávan til HM verður innsavnað.

## Ítróttarhøllin í Trongisvági
Tiltakið sum Heimamissiónin skipar fyri: Sunnudagsskúlin ár 2000 »Eingin er ov lítil til Jesus« verður sunnudagin kl. 15. Tiltakið er fyri alla Suðuroynna. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Missiónshúsið á Tvøroyri
Møti verður Kristi himmalsferðardag kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sunnukvøldið kl. 18 møti við Hjørdis og Sannu. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Betel, Vágur
Kristi himmalsferðardagur kl. 18 evangel. fundur.

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur.

Mánadagin kl. 20 bønarfundur.

Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

## Samkoman, Sion Vági
Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.

Telefonandaktin svarar á 373777.

## Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er hvønn mánadag kl. 10.00-18.00 og týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.

Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.

**Ein skúlamyndaframsýning verður í Tilhaldinum á Ólavsøku. Myndir eru frá skúlum í Havn gjøgnum tíðirnar. Áhugi er at lána gamlar myndir av skúlabørnum, lærarum, útferðum o.ø. til framsýningina. Tilhaldið, tlf. 316491.**

*Mánadagin 29. mai*
kl. 10-12 Ítriv
kl. 14-18 Hugnaløta við nál og práti
kl. 15-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikudagin.

*Týsdagin 30. mai*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Frásagnir, søgur, prát og annað

*Mikudagin 31. mai*
kl. 10 Fyrireiking til døgurðan
kl. 12 Døgurði
kl. 15 Túrur út á Boganes

*Hósdagin 1. juni*
Kr. himmalsferðardagur stongt.

*Fríggjadagin 2. juni*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

## Felagið Tórshavn gongutúrur
Sunnudagin 4. verður gongutúrur út undir Síðu í Kaldbak. Farið verður við bussi frá Kunningarstovuni kl. 14.00 Havið góð og heit gonguklæðir og kaffi við. Gingið verður 5-6 tímar. Tilmelding á Kunningarstovuni.

## AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Fundur 20-21.

Fríggjadagin kl. 20-21 og 22.30-23.30.

## Al-Anon fundur
er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 21.00 á vaskarínum.

## AA-fundur í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla (gamla læraraíbúðin).

## Blái Krossur
bjóðar til eftirviðgerð hvørt **mánakvøld** á skrivstovuni hjá Bláa Krossi **á Glyvrum,** kl. 20–21.30. Nærri fæst at vita á tlf. 315575.

## Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 19.00 til 21.00. Tlf. 212380.

## Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið
á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

## Amnesty International Føroya deild
*Tinghúsvegur 18, 4. hædd*
Skrivstovan er opin:
Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

## Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi. Limagjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

## Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
Fyrsta leygardag hvønn mánað: Altjóða náttturði «Potluck» kl. 18.30.
Opið hvørt fríggjakvøld: Samkoma kl. 20.
***Bahá'í-samfelagið í Tórshavn***

## Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur:
far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

## Føroya Astma/ Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.

Felagið hevur Tlf./fax 311419.

## Giktafelag Føroya
tlf. 44 48 03 fax 44 51 04
e-mail: gikt@post.-olivant.fo
Skrivstovan í MBF húsinum hevur opið mánadag frá 14.00 til 16.00, tlf. 310237 ella støkk inn á Íslandsvegi 10 C, Tórshavn.

Foreldrabólkurin at giktsjúkum børnum, Betty og Noel Joensen, Klaksvík, tlf. 45 73 37 eftir arbeiðstíð.

Ungdómsbólkurin: Sára Tummassardóttir, tlf. 37 31 06 eftir skúlatíð, ella e-mail: sara@post.olivant.fo

## Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

## Javni
**Skrivstovan** í N. Finsensgøtu 32, tlf. 314827, fax 310557 er opin soleiðis:
mánadag er stongt,
týsdag kl. 10-12,
mikudag kl. 10-12,
hósdag kl. 10-14,
fríggjadag kl. 10-12.

**Frítíðarklubbin** hevur ymiskar aktivitetir í kjallaranum hjá Javna. Nærri fæst at vita um hetta, við at venda sær til skrivstovuna.

## Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Randfríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

## MBF
Skrivstovan er opin hvønn dag frá kl. 9-16. Sosialráðgevin er at hitta hvønn mánadag millum kl. 10.30-12. Ring og avtala tíð á tlf. 31 73 73.

## Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo

## Silvurbrúdleyp
**Týsdagin 6. juni hava hjúnini Frígerð og Jonhard Mouritsen, Djúpagilsvegur 6, Hoyvík, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Sjónleikarhúsinum í Havn fríggjadagin tann 9. juni kl. 19.**

**Tey, ið ynskja at gleða silvurbrúðarparið við at koma kunnu siga frá á tlf. 315154 áðrenn 1. juni.**

## Brúdleyp
**3. juni giftast í Slangerup kirke Poul Adrian Hansen, ættaður úr Kollafirði og Line Thillemann, Slangerup.**

**Adr.: Scanticon Borupgård, Nørrevej 80, Snikkersten.**

**Leygardagin 3. juni giftast Linda Thomsen, Lopra og Michael Skree úr Keypmannahavn í Sankt Mattheus kirkjuni á Vesterbro í Keypmannahavn.**

**Brúdleypsadr: Føroyingahúsið á Vesterbrogade 17A, 1620 København V.**

**Leygardagin 17. juni kl. 17, giftast í Nólsoyar kirkju, Guri Andreasen úr Klaksvík og Hans Michael Hansen úr Nólsoy. Vælkomst verður kl. 19.**

**Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 3. juni á tlf. 327170, 327150 ella 456955.**

**Leygardagin 24. juni kl. 16 giftast í Leirvíkar kirkju Ninna Christiansen og Tórhallur Justinussen, bæði úr Leirvík. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.**

**Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 11. juni á tlf. 443114, 443146 ella 443315.**

**Leygardagin 1. juli kl. 15 giftast í Gjáar kirkju Haldis Kollslíð Dam, Reiði og Jón Matras, Gjógv. Vælkomst verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl. 19.**

**Tey, sum vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 18. juni á tlf. 321112, 423138 ella 423118.**

**Leygardagin 8. juli kl. 16 giftast í Tvøroyrar kirkju Selma Danielsen, Trongisvágur og Páll Augustinussen, Vágur, búsitandi í Tórshavn.**

**Tey, ið vilja gleðast saman við okkum henda dag, eru vælkomin á veitslu, sum verður í Trongisvágs skúla kl. 19.**

**Vinarliga boða frá á tlf. 320677 ella 222123 í seinasta lagi 18. juni.**

**Leygardagin 8. juli kl. 15 giftast í Hebron í Leirvík Elisabeth Høgnesen, Leirvík og Eiler Hansen, Gøta. Veitslan verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.**

**Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, verða vinarligast biðin at siga frá á tlf. 221274, 320293 ella e-post: eilerh@post.olivant.fo, í seinasta lagi 23. juni.**

**Leygardagin 22. juli kl. 15 giftast úti á Fløtum, Sunrid Helgadóttir í Gong og Óla Hendrik av Fløtum. Brúdleypið verður hildið í Eydnuni á Oyrabakka kl. 19.30.**

**Øll, ið ynskja at gleðast saman við okkum, verða vinarliga biðin um at siga frá á tlf. 316112 ella 316195.**



## Føroyingafelagið í Esbjerg
*Danmarksgade 25,*
*6700 Esbjerg, tlf. 75132747*
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22.00, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

## Føroyingarfelagið í Aalborg
*Lille Kongens Gade 10 B.*
*Tel. 98136330*
Húsið er opið soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00

## Føroyingafelagið í Reykjavík
Øldusløð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

## Føroyingafelagið í Århus
***Vestergade 48 D***
***8000 Århus C***
***Telefon og fax: 86180604***
***Teldupostur:***
***aarstova@teliamail.dk***
***Heimasíðan:***
***http://welcome.to/aarstova***
**Áarstova er opin soleiðis:**
Café Mánad.-hósd.: kl. 16-18
Føroysku bløðini liggja frammi.
Fríggjakvøldsbarr: kl. 21-03
Limir ókeypis atgongd. Onnur kr. 10,-.

**Onnur reglulig tiltøk í Áarstovu:**

**MFS.** Meginfelag Føroyska Studenta hevur opið hvønn mikudag kl. 16-18.

**Føroyskur barnaskúli** annanhvønn leygardag kl. 11-14 (ólíka vikur).

**Sunnudagsskúli** annanhvønn sunnudag kl. 14.30 (líka vikur).

**Bókasavn.** Føroyskar bøkur kunnu lánast mánadag-hósdag kl. 16-18.

**Ítróttartiltøk:**
**Flogbóltur.** Frydenlundskúlin fríggjadag kl. 16-18. Bussur nr. 4.

**Svimjing.** Frydenlundskúlin fríggjakvøld kl. 18-19. Bussur nr. 4.

**Fótbóltur.** Hasselager Hallen fríggjakvøld kl. 21-23. Bussur nr. 15.

## Føroyahúsið í Keypmannahavn
Vesterbrogade 17 A
1620 København V
Tlf. 33 23 15 87
Fax 33 23 15 18
Kunningartlf. 33 23 15 86, sum sigur frá øllum tiltøkum.
Heimasíða:
www.faroehouse.dk
E-mail:
postur@faroehouse.dk
Upplatingartíðir:
mánadag–fríggjadag:
kl. 16.00–19.00.

*1. juni:*
Føroyingafelagið og Skt. Ólavs Kirkjulið skipar fyri útferð til Præstø.

## Ráðgevingin fyri Føroyingar í Danmark
Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark veitir ráð og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum.

Upplatingartíðir: má.tý. hó. kl. 11.30–15.30, mik. kl. 14.00–18.00.
*Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark,*
*Vesterbrogade 17 A,*
*1620 Kbh. V.*

## Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

## Føroyingar í Noregi
**E-mail:**
**foroyar@norden.no**
**Heimasíða:**
**http://www.norden.no/foroyar**
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við tilknýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

sosialurin
www.sosialurin.fo

HAVNAR BIO



# The Story of Us

Ben (Bruce Willis) og Katie Jordan (Michelle Pfeiffer) hava verið gift í 15 ár og hava tvey børn sum eru ávikavist 10 og 12 ár. Tey eru komin til tað paradoksala staðið í lívinum, har tey smáu tingini, sum í sínari tíð gjørdu, at tey vórðu skotin hvør í øðrum, nú eru við at gera enda á hjúnarlagnum. Ógvusligar ósemjur eru gerandiskostur, og næstan alt samskifti fer fram í yvir 85 DB.

Sum avleiðing av hesum taka Ben og Katie ta avgerð, at tey hvør í sínum lag hava brúk fyri at hugsa seg væl um. Ben flytir á eitt hotel eftir at hava latið børnini á summarlegu í tveir mánaðir. Nú hugsa tey um tað, sum farið er seinastu 15 árini.

Katie er tann teirra, ið er meira útfarandi. Hon er eitt ordansmenniskja út í odd og egg, og alt hevur sítt fasta pláss, bæði beinleiðis og í fluttari merking. Hon hevur sína egnu karrieru sum krossorðagátuskrivari, sum eisini hóskar sera væl til hennara lívsfilosofi: um lat verður sett rætt upp á pláss, so er heildin perfekt!




Fríggjadagin 02.06. kl. $20^{45}$ Leygardagin 03.06. kl. $20^{45}$
Sunnudagin 04.06. kl. $19^{30}$

★ BIO KIOSKIN ★
Heitt Pop–Corn – Coca Cola
Góðgæti - Fóm ís o.m.a.

Sí eisini SvF tekstvarp s. 611–613

HAVNAR BIO
✶ Tlf. 311956 ✶



**Billettprísur: 65,- kr.**
Fríggjadagin 02.06. kl. $23^{00}$ Leygardagin 03.06. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 04.06. kl. $21^{45}$



Fríggjadagin 02.06. kl. $22^{30}$ Leygardagin 03.06. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 04.06. kl. $22^{15}$



Fríggjadagin 02.06. kl. $20^{00}$ Leygardagin 03.06. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 04.06. kl. $19^{45}$